

www.oljan.fo

**Jan Müller** 22 - 01 - 2012

# Mærsk skal brúka 1100 borifólk

Danska oljufelagið Mærsk Drilling skal komandi árini brúka 1100 borifolk at manna fleiri nýggjar boripallar og boriskip. Hetta skriva danskir miðlar. Tað eru stóru oljugoymslurnar í Norðsjónum, sum skapa nógva virksemið og er danska felagið farið undir eina lýsingarherferð fyri at fáa sett hesi mongu fólkini. I 2013 og 2014 fær Maersk Drilling fýra nýggjar boripallar og tvey boriskip. Talan er fyrst um at finna fólk at arbeiða offshore, handverkarar, maskinmeistarar og verkfrøðingar. Fram til 2016 fer danska oljufelagið at hava brúk fyri 3000 nýggjum fólkum.